Neistin-Tjaldur 29-20 (16-11):

Tjaldur fast í botni

Við sigrinum sunnudagin tryggjaði Neistin sær, at botnplássið ikki longur er aktuelt, so har verður Tjaldur nú verandi, til kappingin er av.

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Dysturin millum Neistan og Tjaldur líktist í nógvar mátar einum botndysti. Tjaldur er eisini einsamalt botnlið nú, meðan Neistin spakuliga kann loyva sær at hyggja uppeftir, har ikki so langt er til næstu liðini

Tað var bara ta allarfyrstu løtuna, at tað var javnt í botndystinum í høllini á Hálsi sunnudagin, tá Neistin tók móti Tjaldri. Tá tíggju minuttir vóru farnir, var munurin blivin fýra mál, og hann bara spakuliga vaks allan dystin.

Fimm mál vóru á muni í hálvleikinum, men beinanvegin eftir steðgin gjørdu tær bláu ein vørr, so tær í grundini ikki vóru til at fáa aftur. Neistin hevði somuleiðis restina av dystinum fult tamarhald á øllum, og vann sær tí at enda ein tryggan sigur.

Støðan í sjálvum sær er ikki sørt óvanlig hjá Neistanum, tí í roynd og veru merkti sigurin, at Neistin hevur tryggjað sær at sleppa frá vandanum at enda á aftasta plássi.

Tað plagdi annars at vera í hinum endanum á stigatalvuni, at stóru sløgini hjá Neistanum stóðu…

At tað kortini kann vera so skjótt, at tað gongur hinvegin aftur, eru VB og Stjørnan vælsaktans bestu dømini um í vetur, tí upprunaliga gingu bæði feløgini við tí í tonkunum, at frægast mundi vera at taka seg úr kappingini vegna fólkatrot.

Um hugsað verður um yngra tilfeingið hjá Neistanum, so skuldi okkurt verið á veg, ið kundi beint fyri oyðimarkargongdini, hetta kappingarárið í løtum hevur líkst mest.

Mansverja gav einki

Skuldi úrslitið kanska tala fyri seg, so fingu áskoðararnir í øllum førum sjón fyri søgn, tí talan gjørdist ongantíð um ein dyst, ið líktist øðrum enn einum botndysti millum tey bæði liðini, sum higartil hava staðið seg ringast í kappingini.

Allan dystin valdi Tjaldur at mansverja Simona Dziugyte, men tað vísti seg at gerast eins stórur fyrimunur fyri Neistan, ið hevði munandi betur tak á opna spælinum og plássinum, ið komst av, at tveir spælarar soleiðis vóru bundnir alla tíðina.

Og í seinna hálvleiki fekk Neistin ferð á síni skjótálop, ið góvu heilt fitt av málum av sær. Hetta var nakað, ið annars ikki riggaði so væl í fyrra hálvleiki.

Tó skal Tjaldur heldur ikki gerast verri, enn tað var. Men ein orsøk til, at illa lá fyri at fáa nóg stóra úrtøku burtur úr dystinum, var at finna í Neista-málverjanum, Helenu Dam Poulsen, ið stóð ein góðan dyst og mangan tók broddin av málroyndunum hjá Tjaldri.

Tjaldur er nú isolerað í botninum við sínum trimum stigum, meðan tað hinvegin ber til hjá teimum í Neistanum at hyggja eitt sindur meira frameftir, tí við sínum ellivu stigum er Neistin bara tvey stig aftan fyri Kyndil og Stjørnuna, sum nú royna at jagstra StÍF fyri at fáa hendur á bronsuni.

Við VB og VÍF langt framman fyri hini og Tjaldri langt aftanfyri, hevur besta kvinnudeildin hátt-að seg soleiðis, at í miðjuni eru so hini fýra liðini, ið altso bara hava eittans medaljusettið at tráa eftir.

Dysturin í tølum

Neistin-Tjaldur 29-20 (16-11)
Málskjúttar:
Neistin: Simona Dziugyte 5 (3), Súna Mørk 5, Rakul Augustinussen 4 (1), Ása á Neystabø 4, Mildrið Jacobsen 3, Jórun Ludvig 3, Christina Holm 2, Ata Høgnadóttir 1, Lív Sørensen 1
Tjaldur: Milica Ergic 7 (3), Oddvá Fossdalsá 5, Lenka Ribaric 4 (2), Kristine Ellingsgaard 2, Sonja Gleðisheygg 1, Mona Langgaard 1
Brotskøst: Neistiin 6, Tjaldur 7
Útvísingar: Neistin 4, Tjaldur 5
Dómarar: Ragnar Simonsen og Hannis Wardum

1. deild, kvinnur

Støðan

	dystir	v-j-t	mál	vunnin mál	tapt munur	málstig
1 VB	8	7-1-0	523	424	99	24
2 VÍF	8	5-2-1	465	389	76	20
3 StÍF	8	4-1-3	476	489	-13	15
4 Stjørnan	8	2-1-5	431	433	-2	13
5 Kyndil	8	3-1-4	484	493	-9	13
6 Neistin	8	3-0-5	409	440	-31	11
7 Tjaldur	8	1-0-7	384	504	-120	3

Máltindurin

Daiva Toumaite	VB	161	(43)
Asta Petrauskiene	StÍF	159	(40)
Danijela Ercevic	Stjørnan	144	(38)
Simona Dziugyte	Neistin	137	(44)
Sóley Mikkelsen	VÍF	132	(42)
Reda Kurkauskiene	VB	131	(18)
Lotte Sørensen	Kyndil	130	(64)
Milica Ergic	Tjaldur	118	(24)
Lenka Ribaric	Tjaldur	107	(30)
Natasja Stamenkovic	Stjørnan	104	(6)
Alina Olaru	StÍF	103	(8)
Nicoleta Radu	VÍF	84	(1)
Jacklin Durhuus	VÍF	84	(6)
Ileana Manolescu	Kyndil	78	(13)
Laila Jespersen	VB	62	

StÍF-Kyndil 29-24 (14-14):

Koyktur fótur køvdi Kyndil

At Kyndil misti málmannin, tá tveir tríðingar vóru eftir av dystinum, gjørdi ikki støðuna verri hjá StÍF, sum tók av og tryggjaði sær bronsustigini.

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Undan dystinum á Skála sunnudagin vóru trý lið jøvn í stigum - Stjørnan, Kyndil og StÍF - og høvdu samstundis øll tað til felags, at tey nú móti endanum á kappingarárinum eru á bronsuveiðu.

Tí var líka umráðandi fyri bæði StÍF og Kyndil at vinna dystin teirra millum, tí vinnarin slapp leysur úr hesum lítla trunkanum mitt í stigatalvuni.

Yvirhøvur gekk sera javnt á frá byrjan og allan fyrra hálvleik, so alt bendi á ein tættan og spennandi dyst líka til tað síðsta.

Men tá einir tíggju minuttir vóru eftir til hálvleiks, var málverjin hjá Kyndli, Fríða Petersen, so óheppin at koykja sær fótin og noyddist at lata seg taka út.

Ikki var hugsingur hjá henni at halda fram í dystinum, og tí noyddist útispælarin Randi Wardum í mál. Hóast hon í fótbólti er málverji hjá HB, var leikluturin sum hondbóltsmálverji púra nýggjur fyri hana.

Hon gjørdi eisini alt tað, hon kundi gera í málinum, men kortini var missurin av Fríðu nakað, ið ikki kundi sleppa undan at ávirka restina av dystinum.

So er eisini at siga, at StÍF spældi ein góðan dyst og átti munin í seinna hálvleiki, tá avgerðin í dystinum fall.

Royndu at svara aftur

Kyndil royndi at verja seg við eitt nú at mansverja toppskjúttan hjá StÍF, Astu Petrauskiene, men tað munaði so lítið, tí í staðin fekk eitt nú Alina Olaru gongd á sítt spæl.

Hóast StÍF fekk betru byrjanina í seinna hálvleiki og fór eitt fitt petti framum, megnaði Kyndil fleiri ferðir at koma aftur, og munurin upp á fýra mál var minkaður niður í eitt, tá hálvur tími var eftir.

Ta næstu løtuna gjørdi StÍF so eitt lop í málskjótingini og fór frá 21-20 upp á 26-20. Kyndil fekk sær »time-out« og megnaði enn eina ferð at svara nokk so væl aftur, men sum tíðin leið, gjørdist eingin vegur aftur, tí til tað var StÍF-liðið ov vælkoyrandi.

Sostatt gjørdist tað til ein rímiliga tryggan 29-25 sigur, ið gevur StÍF ein lítlan fyrimun fram um Kyndil og Stjørnuna í kappingini um bronsukrónurnar.

Enn eru tó fýra dystir eftir, og tá so tætt er millum liðini í miðjuni, kann enn nógv henda, áðrenn greitt er, hvør strýkur avstað við bronsuni og hvør situr eftir við ongum.

Dysturin í tølum

StÍF-Kyndil 29-24 (14-14)
Málskjúttar:
StÍF: Alina Olaru 9, Asta Petrauskiene 7, Súnfríð B. Jacobsen 5 (4), Anna Maria Berthelsen 2, Anna B. Danielsen 2, Elin Jacobsen 2, Paula Mortensen 1, Poula D. Olsen 1
Kyndil: Iliana Manulescu 7 (1), Annika Ljósstein 6, Sonja Smiljic 5 (2), Ann Mari Wang 4, Sabine Frølund 1, Annika Thomsen 1
Brotskøst: StÍF 4, Kyndil 3
Útvísingar: StÍF 1, Kyndil 3
Dómarar: Sámal Hansen og Kristian Johansen

VÍF-VB 24-24 (14-13):

VB vann 24-24!

Bæði VÍF og VB vístu til fulnar, at hetta vóru bestu liðini í kvinnukappingini í vetur

Kvinnurnar úr Vági høvdu neyvan verið stórt fegnari, um tær veruliga høvdu vunnið í Vestmanna sunnudagin. Men javnleikurin var fyri tær eins væl ein sigur og hann var eitt tap fyri VÍF, tí nú talar einki fyri, at oddaliðið kann fáast aftur.

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Vágbingar vóru væl mannaðir í Vestmanna sunnudagin, og haraftrat vóru teir eisini framúr væl hýrdir, tá teir fóru avstað aftur til Havnar at bíða eftir Smyrli.

Á vøllinum sóu VB-kvinnurnar eisini út sum vinnarar, tá dysturin var av, sjálvt um hann endaði við javnleiki, 24-24.

Fyri VB var tað at rokna sum ein sigur, tí VÍF kom ikki nærri, nú bara fýra dystir eru eftir at spæla. Tí hevur VB sera góð kort á hondini til tað, sum restar í av kappingini.

Tað var eisini ein rimmar dystur, allir áskoðararnir í Vestmanna vóru vitni til seinnapartin sunnudagin.

VÍF vísti, hvat skuldi til, og stríddist sum úlvur á skóg at røkka sínum máli. Kravið var ein sigur, skuldi nøkur livandi vón vera um at hava samband við VB.

Tær í VÍF vísti eisini í verki, at tær skiltu álvaran í dystinum, tí burtur sæð frá tí einu ferðini var VÍF fyrra liðið at leggja seg á odda. Men hóast tað, so megnaði VB hvørja ferð at koma afturíaftur og fáa javnað.

At hetta vóru bestu kvinnuliðini í kappingini í vetur, vístu bæði VÍF og VB til fulnar, tí ferðin á spælinum var sera høg, umframt at dysturin sum heild var sera væl spældur - umframt at vera spennandi frá byrjan til enda, sjálvandi.

Liðini fingu eisini staðfest og prógvað, at tey ikki bara hvíla á teimum dygdunum, sum útlendsku spælararnir hava, tí báðumegin var talan um ein kollektivan innsats, har allar stríddust fyri sakini og gjørdu sítt besta.

Varieraðar uppskriftir vórðu royndar, tá tað ráddi um at dirka mótstøðuverjurnar upp, og bæði málverjar, verjur og álop vístu, at konsentratiónin var 100% allar 60 minuttirnar. Tí gjørdist dysturin eisini so góður og spennandi, sum ein toppdystur kann vera tað.

Avgerandi mál

- Samanborið við steypafinaluna millum okkum og VÍF, so var hesin dysturin nógvar ferðir strævnari. Ferðin var sera nógv frá byrjan til enda, og tað var rættiliga hart at koma ígjognum henda dystin, sigur høgri vongur hjá VB, Rannvá Augustinussen.

- Vit fóru á vøllin fyri at vinna. Men av tí at vit alla tíðina vóru aftanfyri, kundu vit ikki annað enn fegnast um, at tað so at enda eydnaðist okkum at fáa javnleik. Vit vóru glaðar fyri, at vit ikki taptu.

Sjálv skjeyt Rannvá Augustinussen fýra rættiliga avgerandi mál í Vestmanna sunnudagin. Hon kom fyrstu ferð á máltalvuna í byrjanini av seinna hálvleiki, tá hon við tveimum fylgjandi málum fekk javnað til 15-15. Og eftirfylgjandi kom VB fyri einastu ferð í dystinum á odda, 16-15.

Móti endanum fekk hon VB innaftur í dystin við einum máli, tá tað annars var líkt til, at VÍF skuldi fara frá VB. Støðan var 23-20 til VÍF, tá Rannvá skoraði sítt triðja mál, og tá VB so fekk tvey aftrat, meðan tað stóð fast hjá VÍF, var støðan aftur javnleikur, 23-23.

Og so skjeyt Rannvá Augustinussen eisini síðsta og avgerandi málið fyri VB til 24-24, sum hevði við sær, at suðriska ferðalagið í besta hýri kundi fara heimaftur við javnleikinum í skjáttuni.

Ikki nóg kaldar

Júst henda løtan, tá VÍF steðgaði upp á 23-20, var kanska tann mest avgerandi í øllum dystinum, og toppskjúttin Sóley Mikkelsen iðrar seg eisini um, at VÍF ikki megnaði at avgera dystin tá.

- Vit vóru ikki nóg kaldar, tá vit annars høvdu møguleikan at tryggja okkum sigurin. Tá vit høvdu vunnið okkum leiðsluna við hesum trimum málunum, áttu vit eisini at hildið hana, sigur hon.

- Men bæði tá og eisini seinni vóru vit alt ov bráðar og skundaðu okkum ov nógv, heldur enn at geva okkum stundir, tá tað kravdist.

Skundurin var helst eisini størsta orsøkin til, at VÍF ikki fekk sigurin og bæði stigini, og harvið kundi halda fast um FM-vónina. Tær í VÍF dugdu ov illa at geva tol, og tí gjørdist tað ofta sera lætt hjá vælspælandi Daivu Ylaite í VB-málinum at pilka broddin av teimum gjøgnumskundaðu og ofta hálvhjartaðu royndunum, ið komu móti málinum.

Síðsta korterið av dystinum fekk VÍF soleiðis bara tvey mál, harav annað var upp á brotskast!

- At vit ikki megna at hava eitt nóg støðugt álop frá dysti til dyst, er helst størsta orsøkin til, at vit ikki longur kunnu rokna okkum sum FM-kandidatar. Tey fýra stigini, sum framvegis eru upp til VB, skulu vit ikki vænta okkum at vinna innaftur nú, heldur Sóley Mikkelsen.

- Undan hesum dystinum høvdu vit allar grundir til at vóna, men eftir hetta líkist tað mest einum avgreiðsluspurningi hjá VB.

Sær gott út

So avgjørt vil Rannvá Augustinussen kortini ikki siga tað, hóast hon viðurkennir, at VB neyvan kundi verið í einari stórt betri støðu, nú kappingini av álvara gongur móti endanum.

- Tú fært meg ikki at siga, at nú er leyst og liðugt, men við heimadystum móti Kyndli, StÍF og Stjørnuni og útidysti móti Tjaldri sær tað lovandi út. Tað skal eg ærliga viðganga, at tað ger, sigur hon.

- At hava tríggjar heimadystir er gott fyri okkum, men so vil eg eisini fegin siga, at tað næstan var sum at spæla á heimavølli, so nógvir vágbingar vóru komnir at stuðla okkum í Vestmanna. Rópini frá teimum og stuðulin allan vegin gjørdu so sanniliga sítt til, at vit fingu stritt okkum innaftur í dystin og sluppu undan tapi.

Skráin hjá VÍF fevnir eisini um tríggjar heimadystir og ein útidyst, men tá støðan krevur, at VB snávar tvær ferðir av teimum fýra og enntá setir nógv mál til, er neyvan ov nógv avgjørt at siga, at síðstu veruligu vónirnar um triðja FM-heiti á rað eru foknar hjá teimum í Vestmanna.

Hinvegin hevur VB so ruddiliga staðfest, at tað ber til at síggja tað óvanliga henda í føroyskum kvinnuhondbólti. Fyrst var tað um reppið, at VB als ikki meldaði liðið til kappingina, tí ov lítið fólk var, og síðani gekk sum eftir ánni, tá kappingin fór í gongd.

Mong, og kanska enntá fleiri í Vági, hava óivað bíðað eftir, nær liðið veruliga fór at renna seg í mótgongd, men soleiðis hevur ikki verið. Og sigurin í steypafinaluni var so forskot upp á lønina fyri avrikið í vetur, ið neyvan er fult goldin enn.

Í endaspælinum hevur VB ongan dyst tapt, og javnleikurin í Vestmanna sunnudagin var higartil fyrsti dysturin, har fult stigatal ikki er komið burturúr. Einki man vera at ivast í, at tey eru og kunnu vera spent í Vági henda næsta mánaðin…

Dysturin í tølum

VÍF-VB 24-24 (14-13)
Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 9, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 6, Nicoleta Radu 5, Jacklin Durhuus 3 (1), Eyðrit Andreasen 1
VB: Daiva Toumaite 7 (5), Gurið Mortensen 6, Reda Kurkauskiene 5, Rannvá Augustinussen 4, Arnleyð Hjelm 1, Mary Krosslá 1
Brotskøst: VÍF 2, VB 6
Útvísingar: VÍF 2, VB 3
Dómarar: Hartvig Joensen og Trygvi Mortensen